# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.




## 28 námsfrøðingar tikið prógv



*Námsfrøðingarnir sum tóku prógv vóru: Vivian Bjartalíð, Dagmar Clothier, Johan Dalsgaard, Christina Danberg, Anna Debes, Anja Djurhuus, Emly Djurhuus, Ketty á Fríðriksmørk, Rúna Lamhauge, Joan Heinesen, Birna Henriksen, Katrin Horn, Krista Hvannastein, Gunnvør Jacobsen, Petur Einar Jacobsen, Sóley Jacobsen, Monika J. Joensen, Janus Kannuberg, Sigrid á Kinn, Bertha Lambaa, Eyðbjørg Lervig, Sanna á Løgmannsbø, Sólfríð í Mittúni, Anna Poulsen, Krista Poulsen, Lis Sørensen, Noomi á Vollanum og Malan Wacher*

Fríggjadagin 3. februar fingu 28 námsfrøðingar prógv á Føroya Lærarskúla.

Í røðu síni til námsfrøðingarnar segði Pauli Nielsen rektari m.a. Ein góður spurningur hjá tykkum at seta, nú tit skulu hava lívið hjá øðrum meira ella minni í tykkara hondum, er, hvør ið høvuðsuppgávan er.

Tá ið elsta abbadóttir mín var umleið 5 ára gomul, spurdi onkur hana, sum vit vaksnu hava til vana, hvat ið hon ætlaði sær at vera, tá ið hon bleiv stór. Glað, svaraði hon uttan at blunka, og helt so áfram við tí spæli, sum hon var upptikin av. Um sama mundið kom ein bók við samrøðum við kenda spansk/baskiska heimspekingin Fernando Savater. Bókin ber heitið: "Listin at liva". Einastaðni verður hann spurdur: Hvat er títt størsta ynski í lívinum? og svarið er stutt og greitt: "Gleði". Eg haldi tað vera sera stuttligt, at heimspekingurin og abbadóttirin tykjast at vera líka klók.




P/f. M.J. Saltsøla:

## Magni Johannesen nýggjur høvuðspartaseigari

**Við árskiftið var ættarliðsskifti hjá Pf. M.J. Saltsølu í Havn. Stjóri og høvuðspartaseigari í dag er Magni Johannesen, ið hevur tikið við eftir pápan, Mortan Johannesen, sum hevur stjórna fyritøkuni síðan 1988**

### FYRITØKA

1. januar 2006 keypti Magni Johannesen meirilutan av partabrøvunum í Pf. M.J. Saltsølu á Vestaru bryggju í Havn. Hann hevur verið settur stjóri í fyritøkuni síðan 2001. Fyritøkan hevur frá byrjan selt og umboðað kenda Ibiza-saltið, sum í mong ár var næstan einaráðandi á føroyska marknaðinum.

Magni er 30 ára gamal. Hann lærdi til sølumann á goymsluni hjá P/F Leif Mohr og hevur eisini hægri handilsskúlaprógv. Áðrenn hann fór í læru, arbeiddi hann eitt ár í saltnáminum hjá Salinera Espanola á Ibiza í Spania, har hann arbeiddi á saltgoymsluni og lærdi seg spanskt.

Føroysk Saltsøla varð stovnað í 1957 av Hvannasundsbrøðrunum Hans Paula, Pola, Andreas, Svenning, Kaj og Óla Johannesen og Esmar Fuglø. Seinni keypti Hans Pauli Johannesen øll partabrøvini, og rak fyritøkuna til hann andaðist í oktober 1988. Tá tók sonurin Mortan Johannesen yvir.

Eftir búskaparkreppuna fyrst í 90-unum var fyritøkan endurstovnað í 1994 og skifti navn til M.J. Saltsøla.

Í dag arbeiða fýra fólk hjá M.J. Saltsølu. Fyritøkan selur millum 16 .000 og 18 .000 tons av Ibiza-salti í Føroyum um árið, tó kunnu tað vera ár, sum tað verða seld heili 22.000 til 23.000 tons. Uttan fyri Føroyar selur fyritøkan umleið 12.000 til 15.000 tons um árið.



*Feðgarnir Mortan og Magni Johannesen á skrivstovuni hjá M.J. Saltsølu. Málningurin er av trolaranum Fiskanes, sum stovnarin av fyritøkuni, Hans Pauli Johannesen, førdi*

*Mynd Jens Kristian Vang*